



# Jólagávur í 110 ár




Í handlinum Maria Poulsen Búnýti hava tey fyrireikað seg væl til jólini. Har er alt at fáa frá alskyns jólapynti til jólagávhugskot í øllum prísklassum.

Maria Poulsen Búnýti í Tórsgøtu man teljast millum elstu handlar í landinum og ein býarmynd í Havn. Handilin stavar upprunaliga frá 1900, tá Ludvig Poulsen, maður Mariu Poulsen, sum stovnaði sína egnu blikksmiðjufyritøku í 1890, byrjaði at selja køkslutir, postalín og glas. Síðan 1906 hevur handilin hildið til á somu adresssu í Tórsgøtu.

Hóast handilin er 110 ára gamal, hevur hann alla tíðina verið dagførdur við tí nýggjasta innan búnýti á marknaðinum. Har eru nógv kend merkir sum t.d. Raadvad, Rosendahl, Royal Copenhagen, Titan, Villeroy & Boch, Adax, Georg Jensen, Bodum og HolmeGaard. Handilin hevur eitt stórt úrval av ferðataskum, handtaskum og kuffertum av øllum sløgum.

Til jóla er handil á tremur við jólapynti sum t.d. jólaligum eskjum, nissufigurum, jólakúlum, jólahjørtum, kalendaraljósum, jólatræsstjørnum, jólaklokkum, jólakrússum og nissum við lanternum til fýrfatsljós.

Jólagávuhugskotini tróta heldur ikki, har er alt innan búnýti sum t.d. skálir, gløs, salt- og piparkvørnir, feittskiljarar, ljósastakar, grýtur, pannur og kasserollur.

Øll eru vælkomin í handilin at síggja okkara stóra úrval av jólapynti og gávuhugskotum, sigur Súsanna á Dul, handilsleiðari í Mariu Poulsen Búnýti.